UTTAN ÚR HEIMI

## Toskurin skal friðast

Tann 22. desember fara fiskimálaráðharrarnir hjá ES-londunum at áseta kvoturnar fyri næsta ár.

Í Danmark fylgja fiskimeninir væl við tí, sum hendir í hesum døgum, tí ES hevur júst al-mannakunngjørt eitt tilmæli, sum millum annað sigur, at ræ ttast er at banna allari toskaveiði í stórum pørtum av Norðsjónum. Tilmælið umfatar eisini Eystrasalt, og har sær lítið mætari út. Serfrøðingarnir mæla til at skarva 3.000 tons av toskakvotuni har, samstundis sum teir mæla til at skerja fiskiskapin eftir tungu, skrubbu, skøtu og fleiri øðrum fiskasløgum.

Danskir fiskimenn halda tilmælið vera heilt burturvið, tí eftir teirra tykki eru stovnarnir als ikki so illa fyri, sum fiskifrøðingarnir siga. Formaðurin í fiskimannafelagnum, Flemming Ebey Kristensen, sigur við Politiken, at fiskimenninitr eru serliga misnøgdir við uppskotið um at banna allari toskaveiði í 40 prosentum av teimum bestu fiskileiðunum í Norðsjónum.

## Melda seg úr kirkjuni

Leiðslan í svensku kirkjuni fer nú at kanna, hvussu tað kann bera til, at umleið 250.000 fólk hava meldað seg úr kirkjuni, síðani kirkjan og staturin vórðu skild sundur fyri fýra árum síðani. Bara í ár hava 78.000 sviar meldað seg úr kirkjuni.

Tað hevur altíð staðið svium frítt at melda seg úr kirkjuni, og tí undrar tað fleiri, at so mong hava valt at gera tað júst nú. Guðfrøðingurin Johan von Essen, sum hevur kannað málið, sigur við Dagens Nyheter, at orsøkin er helst tann, at nú kunnu fólk síggja á sjálvuppgávuni, hvussu nógv tey rinda kirkjuni. Fyrr var hetta partur av skattinum, men síðani staturin og kirkjan vórðu skild sundur, er kirkjuskatturin komin at standa fyri seg á sjálvupp-gávuni.

Kanningar hava annars víst, at tað eru serliga menn við góðari inntøku, sum melda seg úr kirkjuni, men at konan og børnini verða verandi limir í kirkjuni. Á tann hátt sparir húskið kirkjuskattin, men hevur framvegis atgongd til tænasturnar, sum kirkjan veitir fólki.

Leiðslan í svensku kirkjuni hevur hug at geva fjølmiðlunum og serliga Aftonbladet skyldina av, at so nógv fólk hava valt at melda seg úr kirkjuni. Í oktober í fjør hevði blaðið fleiri greinar um, hvussu fólk kundu spara fleiri túsund krónur um árið við at melda seg úr kirkjuni.

## Nú skal skattasvik avdúkast

Burtursæð frá fótbólti er skattasvik tann mest avhildna ítróttin í Argentina, men nú ætla myndugleikarnir at gera nakað við hetta.

Tað er guvernørurin í høvuðsstaðnum Buenos Aires, sum hevur tikið stig til eitt átak ímóti skattasviki, og hann fær fullan stuðul frá forsetanum, Nestor Kirchner. Sambært forsetanum hava umleið 35.000 múgvandi argentinar forvunnið einar fimm milliardir krónur uttan at geva tað upp. Pengarnir liggja fjaldir í teimum nógvu bankaboksunum í høvuðsstaðnum og øðrum býum, men nú ætla myndugleikarnir at útvega sær atgongd til bankaboksirnar, og tey, sum verða avdúkað, skulu revsast.

Skattaserfrøðingar siga, at múgvandi argentinar hava flutt ovurhonds nógvar pengar av landinum tey seinastu árini fyri at sleppa frá at gjalda skatt av teimum. Skattavaldið heldur, at talan er um einar 100 milliardir dollarar.

## Ikki fólkaatkvøða

Í Svøríki eru teir politisku flokkarnir samdir um, at sviar skulu ikki á fólkaatkvøðu um ta nýggju grundlógina hjá ES.

Gøran Persson, forsætisráðharri, vísti fyrradagin á, at tað er ikki vanligt við fólkaatkvøðum í Svøríki, og stjórnin og hennara stuðulsflokkar halda heldur ikki, at tað er neyðugt at leggja ES-grundlógina fyri almenningin at taka støðu til, segði hann. Hesum hava teir borgarligu andstøðuflokkarnir tikið undir við.

Flokkarnir eru samdir um, at tað er nóg mikið, at Ríkisdagurin tekur støðu til grundlógina. Kortini er ætlanin at fáa almenningin at taka lut í viðgerðini, sigur Gøran Persson.



*Williams J. Burns var herfyri í Ramallah og tosaði við palestinsku leiðararnar. Her stendur hann framman fyri einari mynd av fyrrverandi palestinska leiðaranum Yasser Arafat*

*Mynd: Reuters*

# Útlitini í Miðeystri so góð sum ongantíð fyrr

**USA fer at leggja stóran dent á at fáa gongd á friðarar-beiðið í Miðeystri, og útlitini fyri, at nakað kemur burturúr, eru góð**

MIÐEYSTUR

*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Amerikanska stjórnin fer ikki bara at leggja stóran dent á at virka fyri varandi friði ímillum ísraelsmenn og palestinar. Vit ætla okkum at ganga undan, sigur varauttanríkisráðharrin William J. Burns.

Hann er ikki í iva um, at tíðin er tann rætta til at fáa gongd á samráðingarnar um varandi frið, og han heldur, at bæði ísraelsmenn og palestinar eru greiðir yvir, at tað er nú, tey røttu stigini skulu takast.

William J. Burns vísir á, at palestinararnir skulu hava nýggjan leiðara, og at ísraelska stjórnin fyrireikar eina fullkomna afturtøku úr Gaza-geiranum. Hetta kann gerast byrjanin til nakað nýtt, sigur varauttanríkisráðharrin, soleiðis at friðarætlanin hjá ST, USA, ES og Russlandi kann setast í verk.

Sjálvandi hevur tað stóran týdning, at ísraelsmenn veruliga eru sinnaðir at taka seg aftur, og at palestinararnir eru til reiðar at fremja neyðugar nýskipanir, sigur William J. Burns við Aftenposten.

Hann hevur drúgvar diplomatiskar royndir og hevur fleiri ferðir verið virkin í arbeiðinum at fáa frið í Miðeystri. Nú er hann leiðari á einari serligari Miðeystur-deild í uttanríkisráðnum í Washington, og hann er bjartskygdur.

- Útlitini fyri friði eru betur enn kanska nakrantíð fyrr - eisini fyri einum palestinskum ríki, tí bæði ísraelsmenn og palestinar vilja hava frið.

# Russland bjóðar USA av

**Russar hava fingið sær fleiri nýggjar vápnaskipanir, sum eru venda ímóti amerikonsku verjuni, og sum eru ein beinleiðis avbjóðing til USA sum heimsins einasta veruliga stórveldi**

HERNAÐARMÁL

*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Teir seinastu mánaðarnar hava russiskir leiðarar almannakunngjørt tíðindi um, at Russland hevur fingið ella er í ferð við at fáa sær nýggjar vápnaskipanir.

So seint sum mánadagin visti stjórnarblaðið Rossijskaja Gaseta at siga, at russar hava ment eina nýggja rakett, sum kann flyta fleiri fleiri hundrað kilo av spreingievni, og sum harafturat er sera beinrakin.

- Hon kann sendast avstað ígjøgnum eitt vindeyga, skrivaði blaðið hjá verjumálaráðnum, Krasnaja Svesda.

Granskarin Shannon Kile, sum arbeiðir á svenska stovninum SIPRI, sigur við Politiken, at tann nýggja russiska rakettskipanin er fyrst og fremst ætlað sum liður í bardaganum ímóti yvirgangi. Hann vísir á, at higartil eru tað bara amerikanararnir, sum hava havt rakettir, sum eru sera beinraknar, sama hvussu langt málið er, men at russar eftir øllum at døma hava fingið tilsvarandi rakettir nú.

Fyri fjúrtan døgum síðani segði Vladimir Putin, forseti, at Russland hevur ment nýggjar kjarnorkurakettir, sum eru førar fyri at sleppa ígjøgnum ra-kettverjuna, sum USA ætlar at fáa sær. Hann boðaði samstundis frá, at Russland tryggjar sær rætt til at søkja at málum í londum, sum útvega sær hópoyðingarvápn.

Shannon Kile sigur, at Putin hevur lagt stóran dent á at menna russisku hermegina, og tað hevur havt sín týdning, heldur granskarin.

- Tíðindini um tey nýggju vápnini vísa, at Russland ætlar sær at verða eitt stórveldi, sum onnur skulu hava virðing fyri, sigur Shannon Kile.